# Ein sigur á sjálvsstýrisleið

**Nú, vit hava fingið staðfest rættin hjá føroyska fólkinum í altjóða rætti, kunnu danir ikki longur spenna bein fyri okkum, um teir skuldu ynskt tað. Hava vit árræði og vilja til at fara úr ríkisfelagsskapinum, kunnu danir ikki sæyta fyri tí longur,tí sjálvsavgerðarrætturin hjá føroyska fólkinum er nú staðfestur sambært altjóða rætti, sigur løgmaður Jóannes Eidesgaard.**

NÝGGJÁRSRØÐAN
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

Herfyri varð uttanríkispolitiska lógin fráboðað Sameindu tjóðum. Í hesi fráboðan varð sjálvsavgerðarrætturin hjá Føroya fólki staðfestur í altjóðasamfelagnum. Sjálvsavgerðarrætturin, yvirtøkulógin og n‡ggja stjórnarskipanin, sum skal vera liðug við árslok næsta ár, gera, at vit nú av røttum kunnu siga, at sjálvstýrismálið er okkara burturav.

Í røðu síni gamlaárskvøld staðfesti løgmaður, at uttanríkispolitiska lógin, sum varð samtykt í apríl mánaði í fjør, varð fráboðað ST. Løgmaður fortelur, at danska stjórnin í samráð við Føroya Landsstýri, stutt fyri jól boðaði ST frá

Sjálvur metir løgmaður fráboðanina vera ein stórsigur fyri føroyingar á sjálvsstýrisleið.

-Tað var jú fyrst og fremst sjálvsavgerðarrætturin hjá føroyingum, sum kollrendi fullveldissamráðingarnar í 2000. At vit nú hava fingið staðfest okkara sjálvsavgerðarrætt í altjóða rætti má sigast at vera ein stórur sigur fyri føroyskan sjálvstýrispolitikk, heldur Jóannes Eidesgaard.



Løgmaður leggur afturat, at nú stendur tað til føroyingar sjálvar nær vit vilja gera okkum dælt av hesum rætti.

- Nú, vit hava fingið staðfest rættin hjá føroyska fólkinum í altjóða rætti kunnu danir ikki longur spenna bein fyri okkum, um teir skuldu ynskt tað. Hava vit árræði og vilja til at fara úr ríkisfelagsskapinum, kunnu danir ikki sýta fyri tí longur,tí sjálvsavgerðarrætturin hjá føroyska fólkinum er nú staðfestur sambært altjóða rætti Hetta kemur av, at altjóða rætturin er omanfyri statsrættin, sum danir vanliga hava hildið fast um, greiðir løgmaður frá.

Sambært løgmanni er sjálvstýrismálið endaliga fingið í fasta legu, og nú er tað upp til føroyingar sjálvar, hvussu farast skal fram í málinum.

Jenis av Rana:

# -Vit høvdu raðfest øðrvísi

**Formaðurin í Miðflokkinum, Jenis av Rana, heldur, at løgmaður átti í nýggjársrøðu síni heldur at lagt dent á tey mál, sum hava savnað okkum føroyingar seinasta árið enn at nýta so stóra orku til mál, sum skilja okkum sundur**



*-Løgmaður dámar væl at provokera, og tað er helst orsøkin til, at hann nevnir tey samkyndu í røðuni. Vit høvdu heldur raðfest at nevnt tey sinnisveiku, einkir og tey sum liva á skuggasíðuni, vísir Jenis av Rana á*

Savnsmynd

NÝGGJÁRSRØÐAN
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

-Heldur enn at leggja so stóra orku í mál, sum seinasta árið hava skilt okkum sundur, átti løgmaður at lagt dent á mál, sum hava savnað okkum. Løgmaður hálovar allar møguleikarnar, sum yvirtøkulógin og uttanríkispolitiska lógin gevur, og reypar av íslandsáttmálanum, hóast bæði mál hava elvt til mikið stríð seinasta árið.

Formaður Miðfloksins og andstøðulimurin, Jenis av Rana, heldur ikki nógv um røðuna hjá løgmanni gamlaárskvøld. Hann fílist á millum annað á, at løgmaður ikki nevndi, hvønn framíhjárætt vit føroyingar hava sammett við aðrar tjóðir.

- Ein Miðflokkaløgmaður hevði uttan iva lagt dent á, hvussu eydnusom vit eiga at vera fyri at búgva í Føroyum, tí vit dag og dagliga kunna liva í sátt og semju, og sleppa undan teimum stóru vanlukkum, sum herja londini uttanfyri okkum, heldur hann.

Jenis av Rana heldur eisini, at røðan í fleiri støðum var rættiliga óítøkilig. Her sipar formaður Miðfloksins serliga til partin um vinnulívið, sum hann kallar fyri ein slutur fyri ein slatur.

**Raðfest øðrvísi**

Jenis av Rana gevur kortini ikki bara ilt av sær. Hann hevur eisini rós at bera løgmanni. Hann sigur seg dáma væl tann partin av røðuni, har løgmaður nevnir, at vit hava brúk fyri hvørjum einstøkum borgara og at øll eiga at hava ein møguleika at virka í føroyska samfelagnum.

-Tað skal kortini ikki vera nakar ivi um, at vit høvdu nevnt aðrar samfelagsbólkar enn løgmaður gjørdi. Løgmaður dámar væl at provokera, og tað er helst orsøkin til, at hann nevnir tey samkyndu í røðuni. Vit høvdu heldur raðfest at nevnt tey sinnisveiku, einkir og tey sum liva á skuggasíðuni, vísir hann á.

# Hoydal skelkaður av fráboðanini



*-Hetta má sigast at vera eitt frontalt álop á fullveldisrørsluna í Føroyum. At fráboða altjóða samfelagnum, at vit ikki eru føroyingar longur, men "Kongeriget for så vidt angår Færøerne" uttan at spyrja nakran eftir er eitt ógvisligt stig skeivan vegin*

Savnsmynd

**Fráboðanin av yvirtøku- og uttanríkis politiska lógini til altjóða samfelagið er eitt frontalt álop á fullveldisrørsluna í Føroyum, heldur Høgni Hoydal. Hann fílist á, at nýggjársrøðan er farin frá at vera ein heilsan til føroya fólk til at vera politiskt propaganda.**

NÝGGJÁRSRØÐAN
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

-Nýggjársrøðan hjá løgmanni var sum fýrverkið, vit skjóta á nýggjárinum. Har vóru bæði glitur og roykták, men eingin politikkur aftanfyri. Eg haldi tað er ein keðilig gongd, at nýggjársrøðan seinastu árini er farin frá at vera ein heilsan til føroya fólk til at vera politiskt propaganda.

Formaður Tjóðveldisflokssins, Høgni Hoydal, hevur ikki nógv føgur orð at bera nýggjársrøðuni hjá løgmanni. Hann vísir, at løgmaður fyrst og fremst nýtti røðuna til at mála ein mynd, ið hevur lítið við veruleikan at gera.

- Løgmaður royndi í røðu síni at pynta sín egna leiklut sum løgmaður. Tað er eingin loyna, at sitandi samgonga hevur borið seg ábyrgdarleyst á útlendingaøkinum, men kortini velur løgmaður at pynta ábyrgdarleysan politikkin við at vísa á, hvussu stóran týdning útlendingar hava fyri fjølbroytni í okkara samfelag, vísir Høgni Hoydal á.

Hann leggur afturat, at tað kundi verið meira hóskandi hjá løgmanni at tora at sagt, hvussu støðan verulig er, og biðið um orsakað fyri vánaligu viðferðina, sum sitandi samgonga vísir tilflytarum.

-Løgmaður hálovaði føroyska mentanarlívinum, og eisini á hesum økinum pyntaði hann um veruleikan. Hóast gylt vallyfti hevur sitandi samgongu verið við til at skerja mentanarøkið munandi. Her hugsi eg serliga um Mentanargrunn Landsins, Musikskúlan og Tjóðpall Føroya, sigur hann.

**Hvakk við**

Formaður Tjóðveldisfloksins fortelur, at hann hvakk við, tá hann hoyrdi løgmann boða frá í røðu síni, at yvirtøku- og uttanríkispolitiska lógin eru fráboðaðar ST, tí hetta var av sonnum fesk og óvæntað tíðindi.

- Hetta má sigast at vera eitt frontalt álop á fullveldisrørsluna í Føroyum. At fráboða altjóða samfelagnum, at vit ikki eru føroyingar longur, men "Kongeriget for så vidt angår Færøerne" uttan at spyrja nakran eftir er eitt ógvisligt stig skeivan vegin. Eg fari alt fyri eitt undir at kanna, hvat er farið fram í samband við hesa fráboðanina, sigur Høgni Hoydal.

Hann leggur afturat, at hann alt fyri eitt fer at seta seg í samband við Løgmansskrivstovuna og gera sær dælt av sessinum á Christiansborg fyri at koma til kjarnuna av málinum.

Tá, hann verður spurdur um nakað positivt var at hóma í røðuni svarar formaður Tjóðveldisfloksins stutt og greitt: Jú, mær dámdi væl tríggjar tær seinastu reglurnar, har løgmaður takkaði fyri árið, ynskti okkum eitt av harranum væl signað nýggjár og setti fram ynski um, at vit standa saman í 2006.